


***Nr. 3*** ***8. februar 2015*** ***75. árg.***

# Ikki einsamallur

*Tó eri eg ikki einsamallur, tí at faðirin er við mær.*
*Jóh.16,2.*

Tað eru mong einsamøll menniskju. Ikki bara í býum, men allastaðni. Summi sita einsamøll í síni stovu, og dagarnir eru gráir. Uttan fyri vindeygað gongur lívið sína vanligu gongd, og sjáldan støkkur nakar inn á gólvið fyri at tendra eitt ljós. Summi hava eitt afturlatið og tungt sinni; tey passa tað, sum tey eru sett at passa; men gleðina av at vera saman við øðrum kenna tey ikki nógv til. Onnur halda , at tey eru ser og vilja tí ikki koma teimum ov nær. Úrslitið verður, at tey byrgja seg enn meira inni, kanska gerast tey beisk, og tað er eitt tað versta, ið henda kann.

Tey, sum sita einsamøll, eiga at vita, at kanska var Jesus tað einsamallasta menniskjað, sum hevur livað. Hansara næstringar skiltu hann ikki, og lærusveinarnir sviku, tá ið hann hevði mest brúk fyri teimum. Hann hevði eitt loyndarmál, sum hann ikki kundi tosa við nakað menniskja um, og at enda rópti hann í neyð síni: ”Gud mín! Gud mín! hví fórt tú frá mær?”

Men – og tað er tað, sum uggar mest - hann, sum ikki átti so frægt, sum hann kundi halla høvur sítt at, kundi siga: ”Tó eri eg ikki einsamallur, tí Faðirin er við mær.” Og tá ið hann kundi siga soleiðis, var tað, tí hann altíð var bundin at Faðirsins vilja. ”Eg eigi at…” segði hann. Hann vildi vera undir Guds vilja og bíða eftir Guds tíma. Fet fyri fet gekk hann lýdnisvegin, og tí var hann aldri einsamallur.

*”Hvar Gud vil, glaður fari eg,*
*hann, ikki eg, skal ráða,”*

hava vit mangan sungið, men sannleikin er, at vit tora ikki at lata Gud ráða. Og hví tora vit ikki? Tí vit hava ikki ognað okkum serliga nógv av frelsunnar gleði. Um vit bara kúra og klaga, tippast veitirnar, sum kunna geva okkum gleði og frímóð. Latið okkum tí heldur líta upp við ljósum tonkum í sinninum og ikki gloyma, at tann, sum í dópinum byrjaði góðan gerning í okkum, vil fullføra hann alt til Jesu Krists dag.

*Í hans fylgi har er trygt,*
*har mín sál er uttan frykt*

# Tað er ongantíð ov seint

**R. W. Schambach**

Tá ið eg fyri nakrari tíð síðani var í Seattle í Washington, talaði eg um Lázarus. Tað stendur í Bíbliuni, at tá ið Jesus at enda kom, hevði Lázurus ligið fýra dagar í grøvini. Sjálvt um tað kann tykjast, sum Harrin kom ov seint, so kom hann til rætta tíð. Hann er ongantíð ov seinur. Við øðrum orðum: tað er ongantíð ov seint fyri eitt undur.

Viðhvørt avmarka vit Gud. Maria og Marta høvdu avmarkaða trúgv. Tær søgdu við Jesus: "Harri, hevði tú verið her, tá var bróðir mín ikki deyður!" (Jóh. 11,21 og 32) Tær høvdu gloymt, at Jesus var Kristus, Guds sonur - Immanuel, tað merkir: Gud er við okkum. (Matt. 1,23) Tær høvdu gloymt, at Jesus er uppreisnin og lívið.

Tær vistu ikki, at Jesus hevði bíðað við vilja. Hann vildi, at tey, sum fylgdu honum eftir, skuldu sleppa at síggja hansara undurfullu kraft.

Vit áttu ongantíð at roynt at grundað út Guds tímaætlan. Hann kemur altíð í rættari tíð. Tað er ongantíð ov seint.

Eftir møtið kom ein kona yvir til mín og stakk eitt pappír í hondina á mær. Hon segði: "Torir tú nú at siga, at tað ongantíð er ov seint?"

Veitst tú, hvat ið hatta var fyri eitt pappír? Eitt skilnaðarbræv, liðugt undirskrivað. Hon hevði júst fingið tað frá dómaranum. Tað var endaligt. Maðurin var farin. Hon hugdi beint inn í eyguni á mær og segði: "Torir tú nú at siga, at tað er ikki ov seint?"

Eg smíltist, tók ímóti avbjóðingini og segði: "Tað er ikki ov seint."

Hon segði: "Íðan, hvat so við hesum skjalinum?"

Eg svaraði: "Tú hyggur at tí skeiva skjalinum. Í mínum

skjali stendur skrivað: "Tað, sum Gud tí hevur samankomið, má maður ikki sundur skilja." (Matt. 19,6) Tað er tað, sum eg trúgvi á. Hvussu leingi hevur tú verið gift?"

Hon segði mær, at tey høvdu verið gift í 27 ár og høvdu 5 børn. Eg segði: "Hasin maðurin hevur ikki loyvi at fara frá tær." Eg legði hendurnar á hana og segði: "Heilagi Andi, fá handan jassin at koma aftur til vit og skil, og frels hann og fyll hann við Heilagum Anda." Eg hugdi upp á konuna og segði: "Far heim og fyrireika teg at taka ímóti manni tínum. Hann kemur."

Tað var sjálvandi einki fyri hjá mær at siga tað. Eg skuldi fara frá býnum. Eg eri evangelistur. Eg kann bara koma, prædika og fara mín veg. Men eg trúði sjálvandi tí, eg segði. Kona mín og eg koyrdu frá Seattle til Philadelphia. Tá ið vit komu til Philadelphia, lá eitt bræv frá hesari konuni og bíðaði eftir mær. Eg læt tað upp, og fyrstu linjurnar ljóðaðu so: "Kæri bróðir Schambach! Gud kemur ongantíð ov seint! Gud fekk fatur á hasum jassinum, frelsti hann og fylti hann við Heilaga Andanum. Harrin førdi hann heim, og nú hava vit gift okkum aftur."

Tað er tann máttmikla síðan av trúnni. Lat allan tín hugburð vera trúgv og aftur trúgv og sig: "Djevul, tú ert ein lygnari. Eg ætli mær at trúgva, at Gud ger eitt undur. Hann skal venda hesari støðuni." Tala trúgv. Tala við fjallið, og fjallið má akta tíni orð. Tað er á henda hátt, at tú skalt sanna, hvør kraft er í trúnni.

*Effie Campbell* umsetti.

# *Gott at vera barn*

Danski biskupurin Kaj Jensen sigur einastaðni frá eini kvinnu, sum hevði klettafast álit á Gudi. Hon segði, at mangan tá ið hon skuldi biðja, kom hon ikki longri enn til orðini Faðir Vár. "Tí," segði hon, "tá fari eg at hugsa um, hvat tað merkir, at eg, lítla menniskja, sleppi at rópa Gud í himlinum við tí navninum, og tá fái eg so nógv at takka fyri."

Ja, her er sanniliga nógv at takka fyri. Mong vilja ikki vita av hugsanini, at tey skulu vera bundin at Gudi eins og eitt barn er bundið at móður ella faðir sínum. Men er hetta ikki ein undurfullur tryggleiki? Vit kunna krevja ymiskt av einum starvsfólki, men ikki av einum barni. Eitt barn hevur rætt at vera barn og ikki nakað annað.

Paulus apostul skrivar til kirkjuliðið í Galatia: "Tí at tit eru øll Guds børn við trúnni á Krist Jesus." Gal.3,26.

# Guds almáttur

*Tí at hjá Gudi man ikki nøkur søk vera ógjørlig. Luk. 1,37*

At Gud er almáttugur merkir, at hann megnar at gera alt, tó at forðanir eru. Onki kann steðga Gudi. *Tín gerningur ei hvílir, ei steðgar á títt spor*, yrkir sálmaskaldið. Guds almáttur kom til sjóndar, tá ið hann skapaði alt, og tí játta vit eisini í fyrstu trúargrein trúnna á Gud Faðir, sum skapaði himmalin og jørðina. Og øll Bíblia okkara lovprísar Guds almátti.

Men undursamt er tað, at vit í Bíbliu okkara síggja, at Guds almáttur virkar í hinum stilla og fjalda. Tað liggur ikki Gudi á, at menniskju skulu fara at tæna honum, tí hann er hin almáttugi. Gud vil ikki hava aftan á sær ein riðil av trælum, sum fylgja honum, tí tey tora ikki at gera nakað annað – nei, Gud vil hava eitt fólk, sum fylkist um hin livandi Gud, tí tey hava sæð kærleika hansara, soleiðis sum hann er opinberaður í Jesusi Kristi.

Tí skulu vit øll fara til hin almáttuga Gud við øllum, sum vit ikki megna, og vegurin til hansara gongur um *dyrnar,* Jesus Krist, og Guds kærleika.

*t.* týddi.

---

Tá ið Jesus kemur aftur her niður á jørðina, kemur hann í sínum jødiska identiteti. Tá ið hann setir føturnar á Oljufjallið, kemur hann sum "leyvan av Juda" og "rótskot Dávids". Tí er tað, at tað er so nógv rumbul í Miðeystri. Bardagin er andaligur.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk/fo**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 8. febr. | Tekstur: | Mark. 2,1-12 | bíbliuorð: | Matt. 25,40b |
| 15. febr. | Tekstur: | Matt. 4,1-11; | bíbliuorð: | Matt. 4,10b |
| 22. febr. | Tekstur: | 1.Mós. 30,22-24 og 37, 1-28; | bíbliuorð: | Róm. 2,11 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




*Nr. 4* *22. februar 2015* *75. árg.*

# Gud hevur ognarrættin

*Havi eg ikki loyvi at gera við mítt, sum eg vil. Matt. 20,15.*

Bara ein kann siga hetta, nevniliga Gud, sum hevur skapað allar lutir. Vit eru stødd í einum moralskum ruðuleika. Fólk, sum annars eru skilagóð, kunnu siga, at tey kunnu gera tað, tey vilja, um tey bara sjálvi taka við fylgjunum. Vit fáa eina kenslu av, at byrgingarnar út móti havinum eru skrædnaðar. Tað kemst av, at menniskju ikki vilja hoyra, at **Gud** hevur ognarrættin.

Gud hevur ognarrættin. Hann hevur sett lógir, sum ikki broytast, hóast meirilutin ynskir tær broyttar; men tær eru ævigar og óvikandi. Hóast eggjað verður til at mæla ímóti í eini tíð, har alt verður sagt at vera relativt, og har alt meira verður traðkað undir fót. "Villist ikki! Gud letur seg ikki spotta; tí at tað, sum maður sáar, tað skal hann eisini heysta." (Gal. 6,7).

Teinin, sum vit ganga í dag, fara vit aldri aftur at ganga, og fótasporini avdúka, hvørja leið vit halda. Hygg tí gjølla eftir, hvussu tú gongur! Eitt sindur av varsemi skaðar onki. Spurningurin er ikki, hvat loyvt er, og hvat er forboðið. Spurningurin er: hvat er ráðiligt. Yvir fyri Gudi hava vit aldri rætt. **Hann** hevur rætt at eiga okkum, og hann hevur rætt at gera, hvat hann vil. Tað hava vit **ikki**.

Hvør er **Harrin** í mínum gerandislívi? Er Guds vilji hægstirættur? Hetta eru nærgangandi spurningar. Hvat eigur tú fram um alt at leggja dent á? spyr Luther. Svarið er: Vit eiga fram um alt at leggja dent á at vera Guds kæru børn. – Men er tað soleiðis? Um tað er soleiðis, eigur kósin at síggjast í gerandisdegnum. Ikki so nógv: akk! Men nokk so nógv: Takk! Ikki, hvat eg vil, men: Verði vilji tín! Ikki bara hjálp til sjálvhjálp, men **frelsa** av óuppibornari náði.

Ikki mín lutur, men Kristi fullgjørda verk, givið mær í dópinum.

*Um nakar nú meg spyrja vil*
*um mína grund til frið,*
*um onki annað hoyrir til,*
*sum ein má hava við,*
*enn Jesu blóð og eina tað,*
*sum fleyt á Golgata hin dag,*
*tá svari eg: ”Mín grund er góð,*
*mín grund er Jesu blóð!”*

# Guds góðska og strangleiki

*Sí tá góðsku Guds og strangleika Róm. 11,22.*

Tað er merkiligt, at hesir báðir mótsettu eginleikarnir skulu vera hjá Gudi; men soleiðis er tað. Guds góðska fevnir um okkum altíð: ”Tí at hann letur sól sína rísa fyri illum og góðum og letur regna niður yvir rættvís og órættvís (Róm. 5,45).

Treytirnar, fyri at Guds góðska skal fevna um okkum, eru tær, at vit eisini krøkja okkum í Guds góðsku og í trúgv taka ímóti náðini í Jesusi Kristi. Tí hvat gagn er í tí, at greinin blómar og frøir seg í sólini – hon ber tó ikki frukt av tí, men verður høgd av fyrr ella seinni.

Stremba tí eftir at síggja Guds góðsku líka til dagin í dag! Tel Guds mongu gávur! Tú heldur kanska, at gávurnar eru færri í tínum lívi enn hjá øðrum; men hvussu hevði verið, um Guds góðska ikki hevði fevnt um teg líka til dagin í dag? Hevur Guds góðska leitt teg til umvendingar og til at takka Harranum við munni og hjarta og lívi?

Sleppur Guds góðska ikki at gera hetta, so verður endin tann, at tú upplivir Guds strangleika. Náðin fer at heysta tað, sum hon sáar – hon verður ikki nøgd við minni. Vilt tú sleppa undan Guds vreiði, so kasta teg í Guds føvning.

*t.* týddi.

---

At trúgva upp á menningarlæruna (evolutiónslæruna) er líka tápuligt sum at trúgva upp á jólanissuna. Hygg rundan um teg, mannalikamið er einki ment ella vorðið betri øll hesi mongu ár, tað brýtist niður og oyðilegst, sum tað altíð hevur gjørt. Nei, Ísraels Gud er hann, sum skapað hevur himmal og jørð og okkum við, og menningartrúgvin og kristintrúgvin kunnu líka lítið sameinast sum eldur og vatn.

*e.c.* ums.

# *Tú ert kirkjan*

*" ... at gera hini heilagu fullbúgvin til at gera tænastu ..."*
*Ef. 4,12.*

Um tú heldur, at arbeiðsloysistølini eru høg her á landi, so skuldi tú hugt eftir meinigheitunum. 80% av inntøkuni hjá meinigheitini koma frá 20% av limunum, og tey somu 20% gera 80% av arbeiðinum í meinigheitini. Restin av limunum eru nøgd við bara at vera áskoðarar. Tað er so lætt at halla seg afturá og spyrja: "Hví ger kirkjan einki við henda trupulleikan?"

Bíðja mær eitt sindur: Tað ert tú, sum ert kirkjan; so ger tú sjálvur okkurt! So sigur tú kanska: "Men eg fór úr kirkjuni, av tí at mær ikki dámar, at hon ber seg soleiðis at." Tú mundi ikki fara úr Guds meinigheit, sum er Kristi likam – gjørdi tú tað?" Staðin fyri at tala um tað, kirkjan ikki ger, mugu vit hyggja at okkum sjálvum í speglinum og spyrja: "Hvat geri eg fyri Harran?"

Kennir tú hugtakið lenistólavenjari? Tað er ein, sum greinar dystin, tá ið hann er liðugur, grenjar um avgerðir dómarans, og er væl til passar, har hann situr á áskoðarasessinum, staðin fyri sjálvur at luttaka í dystinum. Bíða mær eina løtu! Tað krevst áhugi at brúka nógvar tímar at venja, væl vitandi, at fólk fara at geyla eftir tær, at mótstøðumenninir fara at takkla teg, og at tú, tá ið dysturin er liðugur, kanska fert av vøllinum gravskitin.

Bíblian sigur, at arbeiðið hjá presti tínum er " … at gera hini heilagu (kristnu) fullbúgvin, til at gera tænastu, til uppbyggingar av likami Krists, inntil vit allir samlir vinna fram til einleikan í trúnni og í kunnleikanum um son Guds, til fulla mensku, til vakstrarmálið fyri fylling Krists." Ef. 4,12-13.

Latið okkum hugsa eitt sindur um tað!

Latið okkum hugsa við framtíðini í huga. Skattirnir í Himli vaksa bara í tann mun, tú gert íløgur á jørðini. Paulus tosar um: "Guds son, sum elskaði meg og gav seg sjálvan upp fyri meg." Gal. 2,20. Minst til, hvat ið Kristus ofraði fyri teg, hvørja ferð Gud biður teg brúka tína tíð, tínar pengar ella tíni evni.

"… et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

# Pápi heldur í línuna

Nakrir plantufrøðingar vóru farnir at leita eftir sjáldsomum plantum. Teir bóru eyga við eina, sum vaks á einum staði, hagar torført var at koma. Teir sluppu ikki til hennara hvørki úr erva ella úr neðra, so teir spurdu ein drong, sum saman við pápanum arbeiddi har í nánd, um hann í línu vildi fara niður eftir blómuni fyri teir. Hann var ikki serliga sinnaður at fara; men at enda játtaði hann, tó við einari treyt: ”Eg skal fara, um pápi heldur í línuna.”

Júst hasa støðu kanst tú hava til allar lívsins avbjóðingar: Set sum treyt, at Pápi í himli heldur í línuna. Tað vil hann. Hann hevur sjálvur sagt: *”Tí at eg Harrin Gud tín, haldi teg í høgru hondina og sigi við teg: Óttast ikki, eg hjálpi tær.”*

# Uppsagdur?

Eg varð uppsagdur; men tá fekk eg mína lívsuppgávu. Tað, sum eg helt vera tað versta, førdi til tað besta. Tá ið aldurnar raka, kunnu vit velja at lata tær knúsa okkum, ella taka við læru og ríða á aldunum til eina positiva framtíð. Vit skulu vera støðuføst og flyta okkum skjótt frameftir og hava álit á, at okkara bestu dagar liggja fyri framman.

Gleð teg. Savna teg og hugsa um okkurt nýtt. Gud kann venda ”undirgangi” til signing.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk/fo**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 22. febr. | Tekstur: | 1. Mós. 30,22-24 og 37, 1-28; | bíbliuorð: Róm. 2,11 |
| 1. mars. | Tekstur: | 1. Mós. 39,1-6 og 19-23; 41,1a+14-43 | bíbliuorð: Jes.41,10c |
| 8. mars. | Tekstur: | 1. Mós.42, 1-29+43,1-15 +32-33; kap. 44 og kap 45; | bíbliuorð: Sálm. 32,1 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74